## Obama rósar Netanyahu

Amerikanski forsetin, Barack Obama, sigur seg vera fegnan um, at ísraelski forsætisráðharrin, Benjamin Netanyahu, takur undir við, at palestinar fáa egið ríki. Tað var í einari røðu um vikuskiftið, at Netanyahu segði seg taka undir við, at palestinar fáa egið ríki. Hann segði eisini, at Ísrael fer ikki at fremja fleiri búsetingar á Vestara Áarbakka, men hann helt uppá, at Jerusalem er og verður høvuðsstaður í Ísrael. Røðan hevur fingið yumsa móttøku. USA fegnast, men palestinar siga, at tað var einki nýtt í tí, sum Netanyahu segði.



## Skoti deyður av H1N1

H1N1, Influensa A ella svínakrím, sum tað eisini verður rópt, hevur nú kravt sít fyrsta mannalív í Evropa. Heilsumyndugleikarnir í Skotlandi kunngjørdu í gjárkvøldið, at svínakrímið H1N1 hevði kravt eitt mannalív har. Hetta er fyrstu ferð, at smittan hevur kravt mannaliv uttan fyri Norður- og Suðuramerika. Sambært skotsku myndugleikunum var sjúklingurin heilsuliga veikur frammanundan. Heimsheilsustovnurin WHO kunngjørdi fríggjadagin, at 29.669 fólk kring heimin eru smittað við H1N1, og at 145 eru deyð av smittuni.

# Gravgangur eftir nýggjum

### Soleiðis virkar Alli

**Alli inniheldur evnið orlistat, sum tarnar upptøkuni av feitti frá tarmunum. Feitt í mati má brótast niður av enzymum, fyri at verða tikið upp í kroppinum. Orlistat darvar hesum enzymum í at virka, við tí úrsliti, at ein partur av feittinum frá mati fer óbroyttur út við skarninum.**

**Alli virkar tó bara klænkandi, um tú samstundis etur minni og soltnari mat enn vanligt.**






**Føroyingar tysja á apotekini, nú fyrsta góðkenda klænkievnið nakrantíð fæst í hondkeyp.**
**- »Ódámligt« um allur fiti nú skal viðgerast við heilivági, heldur formaðurin í Kommunulæknafelagnum**

KLÆNKIEVNI

*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

»Útselt - tíverri«

Hesi boðini fingu kundar á apotekum kring alt landið bert fáar dagar eftir, at nýggja klænkievnið Alli fekst í hondkeyp fyri einum mánað síðani.

Í skundi bíløgdu apotekini nýggjar sendingar av nógv eftirspurda klænkievninum. Og tá vit ringdu fyri at kanna áhugan fyri Alli, var svarið tað sama frá øllum apotekum.

- Alli selur sum heitt breyð, vistu tey at siga á apotekunum í bæði Havn og Klaksvík.

Eisini á apotekunum í Runavík og á Tvøroyri fara pakkarnir við nýggja klænkievninum við rúkandi ferð um diskin.

- Øll vilja hava Alli, so her hevur verið rættiligur gravgangur, ljóðaði tað av Tvøroyri, meðan tey í Runavík vissaðu um, at tey høvdu bílagt eina nýggja sending av Alli, so eysturoyingar ikki koma til fánýtis.

### Tú ert ov kløn

Tey vóru eisini mong, ið bíðaðu í spenningi, tá tað í útlendskum miðlum frættist, at nógv umrødda Alli klænkievnið nú var á veg í apotekini. Hetta er nevniliga fyrstu ferð, at ES kommissiónin hevur givið eitt góðkent klænkievni leyst at selja í hondkeypi. Og tíðindini um, at Alli forðar kroppinum í at upptaka fitan í matinum, hava leingi gingið sum eldur í okkara grannalondum.

Fría atgongdin til nýggja klænkievnið er tó ikki fallin í góða jørð hjá øllum.

Í Danmark stúra læknar fyri, at eitt nú fólk við etingarólagi verða freistað at brúka Alli fyri at gerast enn klænri. Og fyrstu dagarnar Alli fekst í hondkeyp, høvdu donsk apotek eisini trupulleikar av, at fólk, ið als ikki høvdu tørv á at klænka, bóðu um nýggja klænkievnið.

Eisini á føroyskum apotekum hava tey verið noydd at tosað onkrar kundar frá at keypa Alli. Hetta hevur tó ikki skapt stórvegis trupulleikar. Heldur tvørturímóti.

- Eg haldi, at fólk hava kent seg eitt sindur smikrað, tá vit hava greitt teimum frá, at tey í grundini eru ov kløn til at taka hetta klænkievnið, sigur Katrin Knudsen, farmakonom á Tjaldurs Apoteki í Havn

### Kunnu ikki nokta

Alli er nevniliga bert ætlað teimum, sum hava eitt BMI tal, ið er 28 ella hægri. Tað vil til dømis siga, at um tú ert 165 cm høg, skalt tú viga í minsta lagi 76,2 kilo fyri at tað er ráðiligt at taka Alli. Ert tú yvir 18 ár kann ongin kortini forða tær í at at keypa tablettirnar. Eisini hóast túi veruleikanum ert kløn.

- Vit spyrja um BMI talið ella hjálpa kundanum, at rokna tað út. Út frá tí kunnu vit so siga, um hetta klænkievni er egnað til tín. Men vit kunnu ikki nokta at selja fólki Alli, nú tað fæst í hondkeyp, sigur Katrin Knudsen, farmakonom.

Tað er tó ikki allastaðni, at tey hava so stórt álit á, at kundin sigur satt um sína vekt. Á fleiri apotekum í Danmark verða fólk nú vigaði, áðrenn tey sleppa at ogna sær ein pakka av Alli.

### Hjáárin

Leyst lív
Feittut ella oljukent skarn
Feitt ella olja seyrar úr endatarmi
Luft í tarmum

Kelda: Lægemiddelstyrelsen og Netdoktor.dk



### ES-góðkent

Alli er fyrsta ES-góðkenda klænkievnið, sum fæst í hondkeyp. At evnið er góðkent av ES merkir, at tað kann skjalprógvast, at evnið virkar og lýkur tey krøv, sum verða sett slíkum heilivági.